## Kunna um barnavernd

Tey, sum arbeiða við børnum millum 0 og 8 ár í Runavíkar, Nes, Sjóvar, Gøtu og Funnings kommunum, fáa týsdagin í næstu viku kunning um barnaverndarlógina. Kommunurnar, sum hava tikið seg saman í Eysturoyar Barnaverndartænastu, hava fingið Onnu Dam, leiðara á Barnaverndarstovu Føroya, Jenny Petersen, sosialráðgeva og Pól Jákup Thomsen, ráðgeva at lýsa ymisk viðurskifti í sambandi við børn og barnavernd.

## Fingu Sverris søgu

Tann 17. mai, tjóðardag Noregs, handaði íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Haarde, norðmonnum tað fyrsta eintakið av einari nýggjari útgávu av søguni um Sverra kong. Sjálvt hátíðarhaldið var í Norrøna húsinum í Reykjavík, og var tað norski sendiharrin, sum tók ímóti eintakinum. Hetta var fyrsta bókin av fýra, sum íslendingar gjørdu av at lata norðmonnum í sambandi við, at norska kongsveldið helt sína 100 ára endurstovnan í 2005.

# Peningakervið verður lagt lamið

**Tað kann gerast sera kostnaðarmikið fyri føroyska samfelagið, at ongin sáttmáli er fingin í lag millum AFF og Finansforbundet. Eitt samhugaverkfall í Danmark fer ivaleyst at merkja, at Føroyar fíggjarliga verða avskornar frá umheiminum**

VERKFALL
*Kári Mikkelsen*
*kari@sosialurin.fo*



*Eftir samráðingarslitið við føroysku fíggingarstovnarnar umhugsar Finansforbundet møgulig tiltøk í sambandi við verkfallið. Frá vinstru Kenneth Samuelsen, sum umboðar starvsfólkini í Føroya Banka og Trygd, og Kent Petersen, samráðingarleiðari og næstformaður í Finansforbundet*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eftir at samráðingarnar um nýggjan sáttmála millum starvsfólk og arbeiðsgevarar í Føroya Banka og Trygd eru slitnaðar, verður arbeiðssteðgur frá í morginárið. Finansforbundet, ið er fakfelagið hjá starvsfólkunum, sum førir samráðingarnar við Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum, AFF, ætlar sær ikki at sita hendur í favn, meðan arbeiðssteðgurin er.

Møguleikarnir eru nógvir fyri at gera vart við ósemjuna, og ein av teimum er steðga øllum peningaflutningi til og úr Føroyum. Hetta kann gerast við samhugaverkfalli í PBS (Pengeinstitutternes Betalings Service) og BEC (Bankernes EDB Central), sum avgreiðir øll uttanlandsviðurskifti hjá føroysku peningastovnum. Tað fer at lemja stórt sæð allan peningflutning til og úr Føroyum.

- Hetta er fyrstu ferð, at eg havi verið úti í eini slíkari støðu øll tey 15 árini, eg havi samráðst fyri Finansforbundet. Arbeiðsgevarafelagið hevur ikki givið seg ein tumma, meðan vit onnur hava verið til reiðar at flutt okkum munandi. Vit eru komin í hesa støðuna, tí arbeiðsgevarin ikki vil víkja frá tí uppleggi, sum var lagt á borðið frá fyrsta degi. Eitt upplegg, sum vit als ikki kunnu góðtaka, sigur Kent Petersen, næstformaður í Finansforbundet.

AFF krevur ein fýra ára sáttmála, sum tilsamans gevur 11,32 prosent. Sambært útlitini fyri inflatión og príshækkingum verður talan um eina reallønarniðurgongd, hevur Finansforbundet roknað seg fram til.

Kent Petersen heldur, at AFF tekur alt tað føroyska samfelagið sum gísla í hesum málinum.

- Tað er ótrúligt, at mann frá føroyskari síðu góðtekur, at stjórin hjá einum kappingarneyta (Marner Jacobsen, blm.) kann samráðast vegna starvsfólk í einum øðrum peningastovni. Hetta hevði ongantíð kunnað hent í Danmark, sigur Kent Petersen.

Í morgin klokkan níggju eru starvsfólkini í Føroya Banka og Trygd, sum verkfallið fevnir um, kallaði til fundar á Hotel Føroyum, har Finansforbundet fer at greiða frá verandi støðu, og hvørji tiltøk ætlanir eru um at seta í verk.

Aftan á fer mótmælisgonga oman í býin at mótmæla frammanfyri inngongdunum hjá peningastovnunum. Á leið 210 av 285 fólkum í Føroya Banka og Trygd fara í verkfall í morginárið og tí verður virksemið nógv skert. Starvsfólkini í hinum peningastovnunum hava sáttmála og fara til arbeiðis, men so leingi arbeiðsósemjan varðar, verður bert høvuðsskrivstovurnar hjá peningastovnunum og tryggingarfeløgunum opnar. Sí tíðindaskriv frá AFF á síðu 18.

Marner Jacobsen, samráðingarleiðari:

# -So strúkandi gongur tað heldur ikki

**Argumentini, at tað gongur so væl í føroyska fíggjarheiminum, halda ikki. Gamaní hevur vøksturin okkurt einstakt ár verið uppi á 9%, men einki bendir á, at tað er nakað, ið fer at halda komandi fýra árini, sigur Marner Jacobsen**

VERKFALL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Onkur vil vera við, at tað er ein undarlig støða at koma í, tá stjórin í Eik Banka virkar sum samráðingarleiðari fyri Føroya Banka, men hesum er Marner Jacobsen ikki samdur í.

- Hetta er ikki ein støða, sum vit hava ynskt. Tað hevur verið vanligt, at yrkisfeløgini hjá starvsfólkum innan føroyska fíggjarheimin hava samráðst saman. Tað hava tey ikki ynskt hesaferð, sigur Marner Jacobsen, stjóri í Eik og samráðingarleiðari fyri Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum, stytt AFF.

Sum eisini verður greitt frá í tíðindaskrivi, hevur AFF fyri mánaða síðani gjørt sáttmála við Yrkisfelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum, stytt YFF, og hesin sáttmáli er á sama støði sum tann, ið Fíggjarmálaráðið gjørdi við Starvsmannafelagið fyrr í ár. Hesin sáttmálin millum AFF og YFF umfatar 70% av starvsfólkunum á føroyska fíggjarøkinum.

Hini 30% eru limir í Finansforbundet, og umfata starvsfólk hjá Føroya Banka og Trygd.

Spurdur, um tann veruleiki, at starvsfólkini í bankanum hjá Marner Jacobsen longu hava fingið ein sáttmála, sum er lægri enn tann, ið starvsfólkini hjá størsta kappingarneytanum krevja, hevur nakra ávirkan, er svarið nei.

- Tað er støðið, sum lagt er, bæði í sáttmálanum millum FMR og Starvsmannafelagið og millum AFF og YFF, sum er avgerandi, slær Marner Jacobsen fast.

### Eingin ógvusligur vøkstur

Stjórin í Eik Banka kann heldur ikki góðtaka argumentini fyri, at Finansforbundet krevur so nógv meiri í lønarvøkstri enn YFF.

- Tað kann væl vera, at vøksturin í føroyska fíggjarheiminum okkurt árið hevur ligið um 9%, men tað er einki, sum bendir á, at vit fara at síggja líknandi vøkstur komandi fýra árini, og tí ber ikki til at nýta hetta sum grundarlag fyri lønarkrøvunum, sigur Marner Jacobsen.

So tað stutta av tí langa er, at samráðingarleiðarin fyri AFF ikki fer at góðtaka ein sáttmála, sum víkur munandi frá teimum, ið framman undan eru mettir at leggja støðið.

Spurdur, um hann væntar ein drúgvan arbeiðssteðg, sigur Marner Jacobsen, at tað vónar hann ikki.

- Alt er so nýtt enn, so vit mugu fyrst steðga á og stinga fingurin í jørðina. Eg dugi ikki í løtuni at siga nakað um, hvør eigur at taka næsta stigið. Men eg vóni, at glið kemur á skjótt, so vit sleppa undan einum longdi arbeiðssteðgi, sigur Marner Jacobsen, samráðingarleiðari fyri AFF og stjóri í Eik.